# Mentanarskattur heimaftur

**Avtala er fingin í lag við danska Rigs- og Nationalarkivet um at flyta føroyskar mentanarskattir heim aftur til landið. Fyrsti av hesum varð handaðu á samkomu í sambandi við, at Landsskjalasavnið fyllir 75 ár**

MENTANARSKATTUR
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*



*Jane Johansen Pade handar Jógvani á Lakjuni handilsbókina hjá Kongiliga Handlinum fyri 1833*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Í hesum døgum eru tað 75 ár síðani, at Landsskjalasavnið varð sett á stovn, og hetta hátíðarheldur stovnurin í dag.

Men Landsskjalasavnið hevur annað og meiri at feira, enn »bert« føðingardagin. Dagurin markerar eisini byrjanina til eina afturberingartilgongd, sum Rigsarkivet og Landsskjalasavnið hava fingið í lag, um at fáa eina røð av mentanarskattum heim aftur til Føroya.

Hetta eru skrivligar keldur og aðrir viðkomandi lutir, ið hava við Føroyar at gera, og fyrsta liðið í hesi avtalu er ein handilsbók frá Kongiliga Einarræðishandlinum, sum umfatar árið 1833. Bókin varð handað av skrivstovustjóranum í Rigs- og Nationalarkivet, Jane Johansen Pade, og tók mentamálaráðharrin, Jógvan á Lakjuni ímóti vegna landsstýrið. Síðani varð bókin av mentamálaráðharranum handað Sámal Tróndi Finnson Johansen, stjóra á Landsskjalasavninum.

Hátíðardagurin byrjaði í Norðurlandahúsinum í morgun, og hann heldur fram allan seinnapartin. Fleiri røður vórðu fluttar fram, millum annað av hesum trimum nevndu, Sámal Tróndi Finnson Johansen, Jane Johansen Pade og Jógvani á Lakjuni, umframt fleiri øðrum.

Sámal Tróndur Finnson Johansen segði í sínari røðu, at savnið eftir kongiliga Handilin er ein av týdningarmestu keldum til Føroya søgu í 18. og 19. øld.

- Stórt sæð øll fólk, serliga mannfólk, eru á ein ella annan hátt skrásett í hesum savni. Við Kongiliga Handlinum sum grundarlagi ber sostatt til, at siga frá bæði tí lítlu søguni um hitt einstaka menniskja, og um stóru Føroya Søgu, segði Sámal Finnson Johansen.

Hann vísti síðani á, at hetta bert er fyrsta umfar í einari afturberingartilgongd, sum ikki bert snýr seg um skjøl, sum hava sín uppruna í Føroyum

Ætlanin er eisini, at ein breiðari hópur av søvnum ella skjølum, sum í dag verða varðveitt í Danmark, men sum snúgva seg um Føroyar ella hava serligan føroyskan áhuga, á ein ella annan hátt kunnu verða atkomilig fyri føroyingum í Føroyum, segði Sámal Tróndur Finnson Johansen millum annað í røðu síni.



*Jógvan á Lakjuni heldur røðu í Norðurlandahúsinum í sambandi við heimkomuna av handilsbókini hjá Kongiliga Handlinum, og 75 ára føðingardegnum hjá Landsskjalasavninum*

*Mynd: Jens Kristian Vang*



*Hópurin av hábærsligum fólki var komið saman í Norðurlandahúsinum í morgun at hátíðarhalda førðingardagin hjá Landsskjalasavninum*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Heystarveður um vikuskiftið

**Um vikuskiftið verður ófýsið veður, staðfestir veðurmaðurin, Petur Skeel Jacobsen**

Um hugt verður eftir veðrinum leygardagin, so kann ein skilja, at heystið er ávegis.

Tað verður hvassur vindur av suðri og um morgunin fer at regna. Seinnapartin veksur hann vindin enn meiri til skrið – tað er: millum 17 og 21 m/s.

- Men tað verður møguleiki fyri bæði ælaveðri og sólarglottum restina av degnum, sigur Petur Skeel.

Hitin fer at liggja millum 10 og 13 stig.

Sunnudagin verður hvassur vindur av útnyrðingi, við ælum og sólarglottum. Tað verður heldur kaldari, niður í eini seks hitastig.

Mánadagin verður uppaftur kaldari, eini 5 stig, turt og hann minkar vindin nakað.

Týsdagin og mikudagin verður eitt sindur heitari, sólarglottar og lítið avfall.

**sb.**



*- Heystið er komið, staðfestir veðurmaðurin Petur Skeel*